ítróttur

Nr. 27 • týsdagur • 7. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

## So tapti Dráttur

**Talan varð um sannan gysara, tá ÍF sum fyrsta lilðið megnaði at koppað Drátti í landskappingini**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað ber kanska ikki enn til at tosa um nakran veruligan spenning í FM-stríðnum. Men tað var í øllum førum eitt frískt lot í landskappingini, tá ÍF í gjár tók ímóti Drátti í meistaradeildini hjá kvinnum.

Dráttur hevði undan hesum ikki tapt nakran dyst í landskappingini, og við trygga oddasessinum hevur kósin verið rættað beinleiðis móti gullmerkjunum. Tað er hon enn, men ÍF fekk tó prógvað, at Dráttur eisini er til at tosa við.

Heimaliðið var so ruddiliga oman á í fyrsta settinum, men eftir hetta gjørdist spenningurin øgiligur. ÍF tók eisini næsta settið, men so vant Dráttur seg upp. Í hørðum dysti tóku tær bæði tey næstu settini, og so varð hálvgum lagt upp til, at oddaliðið enn einaferð skuldi ríða stormin av. Tað megnaðu tær tó ikki hesaferð, og so fekk ÍF tvey týðandi stig í silvurstríðnum.

Her eru fuglafjarðakvinnurnar nú ájavnar TB í stigum, meðan SÍ nú er dottið niður á fjórða plássið.

Hjá monnunum var eisini dystur á Kambsdali mánakvøldið. Her var Mjølnir á vitjan hjá ÍF, og tóku gestirnir øll stigini við sær.

**Úrslitini**

**Meistaradeild kvinnur**
ÍF-Dráttur 3-2
(25-16, 25-23, 22-25, 23-25, 26-14)

**Meistaradeild menn**
ÍF-Mjølnir 0-3
(20-25, 15-25, 22-25)

# Ingi Højsted tikin út til besta liðið

**Ingi Højsted er fyri fyrstu ferð tikin út til liðið hjá Birmingham, sum mikukvøldið skal spæla í FA Cup. Birmingham hevur nógvar spælarar skadda og leikbannaðar, og nú er føroyski landsliðsspælarin biðin um at gera seg kláran at spæla við besta liðnum**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Ingi Højsted kann koma á vøllin, tá ið Birmingham í kvøld spældir dyst í FA Cup ímóti Reading.

Hetta er ein umdystur, eftir at fyrri dysturin teirra millum endaði við javnleiki, og hesaferð er tað Birmingham, sum hevur heimavøll.

Ingi Højsted hevur fingið at vita, at hann skal við til dystin í kvøld, og hetta er fyrstu ferð, at hann hevur verið í nánd av 1. liði hjá Birmingham.

### Nógvir mangla

Birmingham hevur nógvar skaðar og leikbann til dystin í kvøld, og venjarin Steve Bruce má eftir øllum at døma síggja burtur frá nógvum av sínum spælarum.

Kenny Cunningham, Martin Taylor, Stan Lazaridis, David Dunn, Neil Kilkenny og Mehdi Nafti eru skaddir, og harafturat fáa teir ivasomu Matthew Upson, Olivier Tebily og Muzzy Izzet neyvan spælt í kvøld.

Chris Sutton og Nicky Butt hava fingið smærri løstir, men teir spæla væntandi í kvøld. Tað kunnu tó hvørki Emile Heskey og Damien Johnson, tí teir eru leikbannaðir.

### Bíða til seinastu løtu

Dysturin hjá Birmingham er ímóti sterkasta liðnum í næstbestu ensku deildini, og tí er ikki talan um nakra lætta uppgávu hjá Birmingham.

– Vit kunnu koma at mangla nógvar spælarar til dystin týskvøldið, men vit hyggja eftir støðuni seinnapartin týsdagin, og tá gera vit so av, hvør kann spæla og ikki, sigur Eric Black, ein av hjálparvenjarunum, við heimasíðuna hjá Birmingham City.

Ingi Højsted fyrireikar seg í øllum førum til dystin, og um hann verður við í endaliga hópinum í kvøld, fæst ikki at vita fyrr enn í seinastu løtu.



*Fyri fyrstu ferð er Ingi Højsted biðin um at gera seg kláran til dyst hjá besta liðnum í Birmingham City*

## Finaludómarar settir

**Heri Petersen og Dánjal Samuelsen skulu fyri fyrstu ferð døma steypafinalu. Teir báðir skulu døma kvinnufinaluna um eina viku. Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen døma mansfinaluna**

Hetta stendur greitt, nú endaligu dómaraásetingarnar eru settar til steypafinalurnar.

Tað var kanska ikki óvæntað, at Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen verða settir at døma mansfinaluna. Teir báðir vórðu í fjør kosnir besta dómaraparið í landinum, eins og teir eisini vórðu útnevndir altjóða dómarar.

Kvinnufinalan er so givin Hera Petersen og Dánjal Samuelsen. Teir báðir hava dømt heilt nógvar dystir higartil í ár – í flestu førum við góðum skoðsmálum. Tí er talan heilt greitt um stórt heraklapp til teir báðar.

## John Heri Dam til EB/Streym

EB/Streymur styrkti sær fríggjadagin um hópin við havnarmanninum John Hera Dam.

John Heri Dam er uppvaksin í HB, men hann hevur eisini spælt í ávíkavist B36 og B68.

Á vøllinum trívst John Heri best frammalaga, men hann kann eisini spæla á t.d. vinstra bakki, so tað er ein ógvuliga fjøltáttaður leikari, ið sundalagsmenn hava tryggjað sær í dag.

Í løtuni er ein nigeriumaður, Joseph Odogu, og royndarvenur á Mølini. Odogu er ein bert 21 ára gamal áleypari, ið hevur roynt seg á onkrum ungdómslandsliði hjá Nigeria.

# Kaggin á odda í báðum deildum

**Hóast billardkappingin enn ikki er liðug, so ber tó til at siga, at Billardfelag Kaggans liggur væl fyri at vinna í hvussu er 1. deild og møguliga eisini 2. deild**

BILLARD
*tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Tað ber ikki til at gera endaligu støðuna upp í løtuni, tí einstøk úrslit og dystir mangla. Men taka vit 1. deild so liggur Kaggin á odda. Síðan i kemur Klaksvíkar Billardfelag. Havnar Klubbi er nr. 3 og Suðuroyarliðið aftast. Møguliga tekur Suðuroyarliðið seg úr kappingini, so torført er í skrivandi løtu at gera stigstøðuna upp. Hóast Kaggin harvið missur síni 18 stig móti Tvøroyri, so hevur liðið tó vunnið bæði á Havnar Klubba og Klaksvíkar Billardfelag. Kortini eru langt frá allar súðir syftar hjá kaggamonnum, tí bæði klaksvíkingar og Havnar Klubbi kunnu koma at gera kaggamenn heitar um oyrini í returkappingunum. Neyvan fara Kristian Suni úr KBF og Henrik úr HK at lata sær lynda at geva stig til Kaggan.

Dystur var í vikuskiftinum millum Klaksvíkar Billardfelag og Havnar Klubba. Klaksvíkingar vunnu 10-8.

Í aðru deild liggur Billardfelag Kaggans á odda við 56 stigum. Beint í hølunum er Havnar Klubbi við 50 stigum. Síðani kemur Vágs Billardfelag við 46 stigum, Klaksvíkar Billardfelag við 24 stigum og aftast Tvøroyrar Billardfelag við 14 stigum. Tá høvdu trý bestu liðini spælt tríggjar kappingar, meðan klaksvíkingar og tvøramenn ávíkavist 3 og 4 kappingar.